# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# Fimleikafagnaðurin fer kring jørðina

**Um vikuskiftið verður Norðurlandahúsið aftur karmur um Fimleikafagnaðin. Hesa ferð við eini ferð kring jørðina sum evni**



*Heildarmyndirnar, sum standa eftir fimleikafagnaðin, eru aloftast framúr vakrar. Ikki minst, tí breiddin í einstaka felagnum eisini verður lýst*

FIMLEIKAFAGNAÐUR
*tíðindaskriv*

Skipað verður fyri Fimleikafagnaði annað hvørt ár, og eru dagarnr, 4. og 5. november hesa ferð settir av til endamálið.

Tríggjar framsýningar eru á skránni, og er fyrsta av hesum klokkan 18 leygarkvøldið. Sunnudagin verða tvær sýningar, og eru hesar klokkan 15 og 18.

### á 20. ári

Fimleikafagnaðurin er eitt tað størsta tiltakið, sum Fimleikasambandið skipar fyri, og er hetta 10. ferðin, at tiltakið stendur á skránni.

Her verður fimleikur vístur á ein øðrvísi hátt. Feløgini fáa eitt evni, ið tey skulu lýsa við fimleiki/framførslu, ljóði/ljósi, samanspæli/heildarmynd.

Hetta evnið er í ár Ein ferð kring jørðina.

### Ymsir førleikar døma

13 dómarar eru valdir at døma. Tað er ikki neyðugt, at hesir dómarar hava nakað ávíst samband við fimleik. Men miðjað verður ímóti at finna dómarar við ymiskum førleikum í fjøllbroyttari vinnu. Dómararnir fáa 15-20 minuttir at tosa saman í eftir hvørja einstaka framførslu, og síðani skal ein heildarmeting gerast av, hvør samlaði vinnarin skal verða.

### 400 fimleikarar

Í ár hava 4 feløg meldað til. Tey eru: Fimleikafelagið Flog, Fimleikafelagið Støkk, Fimleikafelagið Ljósið og Havnar Fimleikafelag. Tey hava umleið 100 luttakarar hvør. Feløgini fáa eitt korter til framførsluna, og skal hetta nýtast til at lýsa evnið, samstundis sum nýtsla verður gjørd av breiddini í felagnum. Endaliga avgerðin verður fráboðað frá dómaraborðinum, tá seinna framførslan sunnukvøldið er av.




sansir.fo

X-mas
in Aberdeen

**Vikuskiftistúrur frá 30. november til 3. desember 2006**

Aftur í ár ger Atlantic Airways tað møguligt at fara á jólainnkeypstúr til Aberdeen – býurin við teimum framúr góðu handilsmøguleikunum og bíligu prísunum. Í Aberdeen eru eisini nógv góð matarstøð og fleiri náttklubbar og pub´ar.

Farið verður úr Vágum seinnapartin hósdag, og vit vera aftur í Vágum seinnapartin sunnudag.

Gistast kann á annaðhvørt Brentwood, Patio ella Douglas hotel, sum øll liggja inni í miðbýnum.

Íroknað prísin er: Flogferð Vágar - Aberdeen og aftur, øll avgjøld og gisting í 3 nætur við morgunmati.



Brentwood hotel ***
Fyri hvønn í tveymanskamari v/morgunmati kr. 2.995.-
Eyka fyri einakamar kr. 300.-
www.brentwood-hotel.co.uk



Patio hotel ****
Fyri hvønn í tveymanskamari v/morgunmati kr. 3.230.-
Eyka fyri einakamar kr. 620.-
www.patiohotels.com



Douglas hotel ***
Fyri hvønn í tveymanskamari v/morgunmati kr. 3.080.-
Eyka fyri einakamar kr. 585.-
www.superbreak.com/hotels/hotel-7508.htm

Bílegg ferðina hjá: **Atlantic Airways**, tlf. 341010,
ella á tínari ferðaskrivstovu:

Faroe Travel Tel 342 600 | Alpha Tel 352 900
Flogfelag Føroya Tel 340 000 | Fønn Flog Tel 456 363

ATLANTIC AIRWAYS
www.atlantic.fo

Sosialurin
www.sosialurin.fo